# Koyra skjótt í Sandavági

**Borgarar í Sandavági kæra um ferðsluna, sum fer eftir landsvegnum gjøgnum bygdina. Bilarnir koyra ov skjótt, sigur borgari í Sandavági á heimasíðuni hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Sandavági:**
Ferðslan í Vágum gongur ov skjótt gjøgnum bygdirnar, siga borgarar, sum búgva við landsvegin. Nógv er tosað um málið, men einki ítøkiligt gjørt, siga bæði kommunalu- og landsmyndugleikarnir.

Á heimasíðuni hjá Ráðnum Fryi Feðrslutrygd boðar ein borgari í Sandavági frá, at ferðslan gjøgnum bygdina gongur ov skjótt. Bilar, sum koma úr óbygdum øki inn á bygt øki, seta ikki ferðina niður, meðan koyrt verður gjøgnum bygdina. Tað er til ampa fyri tey, sum búgva fram við vegnum, eins og fyri eitt nú skúlabørnini, sum dagliga ferðast á økinum, verður sagt.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at Sandavágs Kommuna í fleiri ár hevur roynt at fingið loyst hendan trupulleikan í samstarvi við bæði Landsverkfrøðingin og Landsferðslunevndina. Men hóast nógv er tosað, er einki hent. Tað váttar Landsverkfrøðingsstovnurin eisini.



*Ein tilvildarligan fyrrapart mikudag varð hendan myndin tikin. Hon sýnir sjey bilar og ein buss umframt tveir parkeraðar bilar á Giljavegi í Sandavagi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Rósa Samuelsen sigur, at málið er reist fyri Landsverkfrøðinginum í august 2001, og hóast bæði Sandavágs Kommuna og Felagskommunan í Vágum, umframt einstakar borgarar, hava strongt á, er einki hent.

Sandavágs Kommuna kann ikki av sínum eintingum gera nakað við málið, tí talan er um landsveg, sum Landsverkfrøðingurin varðar av.

Ymisk uppskot hava verið uppi í hesum sambandi. Biðið hevur verið um at fáa gjørt rundkoyring í Sandavági. Men tað varð avvíst við teirri grundgeving, at ov lítið pláss var har, hendan varð umbiðin. Eisini er skotið upp at gera oyggjar á vegin við forskotnum gonguteigum. Slíkar sum eru at síggja á R.C. Effersøesgøtu og á Vestara Ringvegi í Havn. Men heldur ikki tað er vorðið til nakað.

Víst er regluliga til, at skúlin liggur á Giljanesi, og har ferðast børnini til og frá eftir hesum høvuðsvegnum, har ferðmarkið er 80 km/t. Skotið er upp, at hetta markið verður lækkað. Men einki er hent.

Sama lagið er innan fyri Giljanes, har miðvágsbørnini ferðast eftir sama vegi og undir somu umstøðum.

Síðan Vágatunnilin lat upp fyri einum góðum ári síðan, er ferðslan gjøgnum bygdirnar økt heilt øgiligt. Tó eru tær hasarderaðu støðurnar, ið fyrr av og á vóru, tá fólk skuldi skunda sær til ella frá ferjuni, ikki meira. Og gott er tað, siga bæði borgarstjórin og tey hjá Landsverkfrøðinginum.

Ferðslan glíður nú betri og er spjadd javnari yvir alt samdøgurðið. Men bilarnir koyra kortini av og á í skjótara lagi, og tað er til ampa fyri tey, sum búgva við vegin.

Finnleif Durhuus á Landsverkfrøðingsstovninum váttar, at samband hevur verið við Sandavágs Kommunu um ferðsluna gjøgnum bygdina. Hann váttar eisini, at einki ítøkiligt úrlsit er komið burturúr, hóast fleiri uppskot hava verið til viðgerðar.

Hann vísir á, at eina tíð stóðu sonevndu ferðgáarnir uppi í Vágum, og tá vístu kanningarnar heilt týðuliga, at bilarnir minkaðu um ferðina, tá teir komu framvið hesum lýsandi talvunum. Men sum fráleið, eftir at ferðgáarnir vórðu fluttir aðrastaðni, vaks ferðin aftur.

Alt ítøkiligt er bundið av játtanini til stovnin, sigur Finnleif Durhuus og leggur afturat, at trupulleikin í Sandavági er ein generellur trupulleiki, sum er galdandi um alt landið.

# Fuglafundur í Føroyum

**Fuglafrøðingar úr fleiri londum halda í hesum døgum fund um sjófuglasamstarvið á Norðurkollinum. Fundurin verður hildin í Føroyum**

FUGLAFUNDUR
*Edvard Joensen*

Sjófuglasamstarvið á Norðurkollinum verður viðgjørt á fundi hjá altjóða arbeiðsbólkinum um sjófuglar, sum hildin verður á Hotel Hafnia um dagarnar.

Sjófuglasamstarvið er partur av CAFF náttúrusamstarvinum, verður sagt í tíðsindaskrivi, sum sent er í smband við fundin.

CAFF stendur fyri Conservation of Arctic Flora and Fauna og er skipað undir Arktiska Ráðnum.



Fuglafrøðingar úr londunum við Norðurkollin umframt úr Niðurlondum luttaka á fundinum. Tríggir føroyingar fara at hava framløgur á fundinum. Teir eru Bergur Olsen, Bogi Hansen og Arne Nørrevang.

Arktiska Ráðið hevur sín uppruna í samstarvinum um umhvørvisvernd í økinum, verður sagt í tíðindaskrivinum. Limalondini eru USA, Kanada, Russland, Ísland, Noreg, Svøríki, Finnland og Danmark. Føroyar eru umboðaðar gjøgnum danska limaskapin.

*Sjófuglasamstarvið á Norðurkollinum er til viðgerðar á altjóða fundi á Hotel Hafnia um dagarnar.*



# Stórur tørvur á ókeypis rættarhjálp



*Savnsmynd*

**Rættarhjálp Føroya fekk seinasta ár nærum 500 fyrispurningar frá fólki kring landið, ið høvdu tørv á løgfrøðisligari ráðgeving**

LØGFRØÐI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Rættarhjálp Føroya var sett á stovn á sumri í 1995. Endamálið við rættarhjálpini er at veita vanliga borgaranum ókeypis løgfrøðisliga ráðgeving. Tað er ógvuliga kostnaðarmikið hjá vanliga borgaranum at keypa sær ráðgeving frá einum løgfrøðingi, og tí er rættarhjálpin ein kærkomin hjálp.

Størsti parturin skjótt avgreiddur

Í farna ári hevði Rættarhjálp Føroya, ið hevur opið fýra tímar um vikuna, ikki færri enn 476 fyrispurningar. Nógv tann størsti parturin av hesum fyrispurningum var skjótt avgreiddur, tí av teimum 476 fyrispurningunum vóru 349 teirra avgreiddir við ráðgeving fyrstu ferð. Einans 39 fyrispurningar, ella sløk 10 prosent, vóru víst víðari til advokat, ið kundi arbeiða víðari við málinum.

Tað er ógvuliga ymiskt, hvat fyrispurningarnir til Rættarhjálp Føroya snúgva seg um. Tað er tó serliga innan arvaviðurskifti, fasta ogn, hjúnarskilnað, trygging og setanarviðurskifti, at tørvur er á løgfrøðisligari ráðgeving. Hesir bólkar eiga okkurt um helmingin av øllum fyrispurningum til Rættarhjálp Føroya.

### Flest fyrispurningar um várið

Várið er tann ársins tíð, har flestu fyrispurningar eru til rættarhjálpina. Ein orsøk til at so er, kann til dømis verða, at hetta er tíðin, tá ið borgarar skulu avgreiða skattaviðurskiftir, og í tí sambandi kann tørvur verða á ráðgeving í samband við eitt nú ognarviðurskiftir og møguligan skatt av arv.

Eitt annað øki, har nógvir fyrispurningar eru, er innan hjúnaskilnað og sundurlesing. Rættarhjálp Føroya fekk í fjør heili 28 fyrispurningar innan hetta øki, og nærum helmingurin av teimum blivu setti í ársins seinasta mánaði, desember. Um tað eru tey mongu jólaborðhaldini, ið eru orsøk til tað, er ilt at spáa um, men tað er neyvan av tilvild.

### 17 ráðgevar knýttir at rættarhjálpini

Rættarhjálp Føroya heldur til í hølum í Gongini í Havn. Skrivstovan er opin týsdag frá seks til átta, og hósdag frá fýra til seks. Heili 17 ráðgevar eru knýttir at rættarhjálpini, og ein teirra, Kristina Samuelsen, er leiðari av skrivstovuni. Harafturat er ein skrivari, ið hevur 15 arbeiðstímar um vikuna.

Av tí at Rættarhjálp Føroya er einasti slíkur stovnur í landinum, er endamálið at røkka øllum Føroyum. Sum nú er, eru tað fólk í Streymoynni, ið eru raskast at nýta rættarhjálpina. Borgarar í høvuðsstaðarøkinum skulu helst koma á skrivstovuna, um tey hava tørv á ráðgeving, meðan aðrir borgarar kring landið kunnu seta fyrispurningin munnliga umvegis telefon ella skrivliga í einum brævi.

Ikki er nakað serligt mynstur í, hvat tað eru fyri borgarar, ið seta Rættarhjálp Føroya fyrispurningar. Kynsbýtið er púra javnt, og tað eru fólk í øllum aldri, ið venda sær til rættarhjálpina fyri at fáa ráðgeving.


## Roknskapurin 2003

### Rakstrarúrslit

| DKK 1.000 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 309.561 | 336.170 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 63.416 | 93.056 |
| **Rentuinntøkur netto** | **246.145** | **243.114** |
| Vinningur av partabrøvum | 291 | 183 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 18.512 | 16.497 |
| Útreiðslur til kostnað og provisiónir | 1.041 | 1.030 |
| **Rentu- og kostnaðarinntøkur netto** | **263.907** | **258.765** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | -5.483 | 33.436 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 16.464 | 11.839 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **274.888** | **304.039** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 117.942 | 121.812 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 921 | 4.935 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 79 | 0 |
| Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto) | 109.630 | -1.399 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 970 | 3.050 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **47.286** | **181.740** |
| Skattur | 9.302 | 35.511 |
| **Ársúrslit** | **37.984** | **146.230** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 37.984 | 146.230 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 1.388.900 | 1.318.720 |
| **Tøkar** | **1.426.884** | **1.464.950** |
| Nýtt til vinningsbýti | 20.000 | 73.000 |
| Javnan av grunni til nettouppskriving til innara virði | 970 | 3.050 |
| Framflutt úrslit | 1.405.913 | 1.388.900 |
| **Tilsamans** | **1.426.884** | **1.464.950** |

### Fíggjarstøða 31. desember

| DKK 1.000 | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 181.947 | 91.681 |
| Ogn hjá kredittstovnum o.a. | 116.702 | 235.662 |
| Útlán | 3.511.795 | 3.412.236 |
| Lánsbrøv o.a | 1.367.758 | 1.566.919 |
| Partabrøv o. a. | 4.958 | 2.422 |
| Kapitalpartar í leysknýttum fyritøkum | 3.677 | 4.330 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 116.305 | 114.416 |
| Ítøkiligar ognir | 68.803 | 52.818 |
| Egnir kapitalpartar | 0 | 0 |
| Aðrar ognir | 31.347 | 39.394 |
| Tíðaravmarkingar | 4.833 | 4.640 |
| **Ognir tilsamans** | **5.408.124** | **5.524.519** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til kredittstovnar og tjóðbankar | 57.301 | 89.192 |
| Innlán | 3.779.942 | 3.832.449 |
| Onnur skuld | 55.926 | 105.233 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 17 |
| Avsetingar til skyldur | 4.843 | 5.500 |
| **Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 100.000 | 100.000 |
| Grunnar | 4.198 | 3.228 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 1.388.900 | 1.318.720 |
| Flutt frá ársúrsliti | 17.014 | 70.180 |
| Eginpeningur tilsamans | 1.510.111 | 1.492.127 |
| **Skuld tilsamans** | **5.408.124** | **5.524.519** |
| **Tøl, sum ikki eru tikin við í javnan** | | |
| Ábyrgdir o.a. | 144.191 | 187.541 |
| Aðrar skyldur | 30.250 | 37.162 |
| **Tilsamans** | **174.441** | **224.703** |

*Vinningsbýtið fyri 2003, 20%, verður útgoldið tann 1. apríl 2004*

FØROYA BANKI